


# Kirkjugarður á Svínaryggi

Óli Jacobsen
olijacobsen@post.olivant.fo



Andreas hjá Dánjali:

# Bragdið í Rituskor

**Tað er eingin ivi um, at eftirkomarar hjá Andrass á Argjum hava verið megnarmenn á ymiskum økjum. Ein av hesum var Andreas hjá Dánjali**



*ANDREAS DANIELSEN F. 8.10 1850 - D. 28.2 1919*

*SUNNEVA MARIA DANIELSEN FØDD MAGNUSSEN F. 24.8. 1853 - D. 4.10 1935*

Dánjal (1818-1891) var næstelsti sonur Elspu og Andrass á Argjum. Tað er ikki nógv vit vita um hann. Men Jákup Andreas Arge, skrivaði í eini grein um pápabeiggjar sínar fylgjandi um Dánjal:

»Daniel var kæmpestor, var en udmærket Stenarbejder, Jordbruger og Fisker. For Købmand M.C. Restorff opførte han Stengærdet om Skaaletrø«.

Dánjal varð í 1844 í Havnar Kirkju giftur við Marionnu Joendatter (1816-1890) úr Havn. Tey fingu sjey børn.

## Tey vóru:

**1. Elsebeth fødd 1844**, giftist í 1875 við Hans Jacob Thorsvig (1845-1887) úr Kirkjubø. Tey fingu børnini Dánjal Hans Marius Arge (1878-1949) og Sunnevu Sofíu Johonnu Frederikku Arge (1882-1933).

**2. Maren (1848-1873)**. Hon var gift við Óla Mortensen, sum fyrr er umrøddur í samband við Mortensen-ættina.. Tey fingu ein deyðføddan son. Óli giftist aftur.

**3. Johanna Elisabeth Sofía f. 1848.** Hon giftist við Michael Andreassen f. 1847 á Nesi. Her doyði hon eisini.

**4. Andreas f. 1850 d. 1919.** Hann giftist 10.2. 1881 heima við hús við Sunnevu Mariu Magnussen (1853-1935) úr Froðba. Spurningurin er so, hví tey giftast heima og ikki í kirkju. Frágreiðingin kann vera tann, at tey høvdu tá longu fingið sítt fyrsta barn. Og tá bar illa til at giftast í kirkju! Børnini verða umrødd í komandi parti.

**5. Sigga Sofía (1853-1871.)** Hon var fødd í Álakeri. Øll hini børnini eru fødd á Argjum.

**6. Vangina f. 1858.** Hon giftist í 1858 í Havnar kirkju við Rasmus Jensen f. 1856 í Korsør. Hann var sjómaður. Tey munnu vera flutt niður, tí hon doyr í Danmark.

**7. Johannes f. 1859.** Giftist í 1880 við Nicolinu Sofíu Hansen f. 1856 á Velbastað. Tey fingu børnini Dánjal Jákup f. 1881, Hans Sofus f. 1883, Marius f. 1885 og Niclas Martin f. 1887

**8. Maren Sofía (1864-1866)**, gjørdist bert 1 ára gomul.

## Meira um Andreas:

Vit hava fyrr umrøtt Palli á Argjum og samrøðuna, sum Dagblaðið hevði við hann, tá ið hann fylti 95 ár. Her umrøður hann eisini Andreas. Blaðið spyr:

– Hava tygum ikki verið burtur hiðani á ungum árum?

– Jú, vit báðir Andrias systkinarbarnið vóru leingi heiman sum ungir. Andrias var í Hvalba og eg var við Gjógv. Tað hava gingið mangar frásagnir um Andrias frá teirri tíðini, ið hann var í Hvalba. Hann var tiltikin raskur og bragdligur maður. M.A. Winther hevur skrivað um hansara roysnisbragd í Rituskor á sinni o.a.m. –

– Tygum róðu eisini dúgliga út hiðani av Argjum!

Og oftast mundi vera farið í longdina, ætla vit.

– Jú, vit róðu vestur í hav, suður á Kant, løgdu Jákups mið og Lítla mið, og ofta fiskaðu vit væl. Frants Restorff, hevði tað einaferð á orði, at sovorðin fiskur var ikki komin í Vágsbotn av Argjum, fyrr enn vit báðir Andrias systkinabarnið vóru afturkomnir at troyta miðini. – Tað var nakað í tí, tí Andrias legði ofta nógv til, hann ivaðist ongatíð í nøkrum.

– Tit róðu oftast sjálvir triði?

– Ja, og sjálvur fjórði, tá ið vit ikki vóru við stórum báti. Men ikki minnist eg, at vit meira enn ta einu ferðina sløgdu fiskin, áðrenn vit fóru aftur at landi. Vit fiskaðu ofta væl kortini.

## Maðurin í Rituskor

Tað er eingin ivi um at Andreas var ein kempa. Niels J Arge hevur í síni bók um Argjamenn eina frásøgn, sum sigur nakað um hetta.

Andreas var í Suðuroy eina tíð. Hann var húskallur undir Vørðubrekku í Sandvík. Andrias framdi - sum 20 ára gamal - eitt tað størsta mandómsbragd, sum er framt í Suðuroy. Tíðliga ein morgun var hann farin sjálvur triði í Rituskor at fleyga. Nú er so vorðið har, at gongt er út eftir einum bretti, ið er seks alin langt, átta tummar breitt og hálvan annan tumma tjúkt. Dýpdin undir brettinum er einar 50-60 favnar, og niða er niðri við botnin. Her gingu góðir og djarvir bakkamenn leysir út í Skorina, meðan aðrir høvdu band á sær. Veðrið var gott og góð ætt, so teir væntaðu sær nógvan lunda hendan dag. Bjørgini røktu hvalbingar og sandvíkingar í felag tá. Hann, ið fyrstur varð, átti sessin fyri dagin.

Alt gongur á besta hátt, og teir seta seg í sessirnar at fleyga. Tveir ungir dreingir úr Hvalba eru eisini farnir frá húsum hendan morgun, men tá teir síggja brettið liggja, venda teir við aftur. Húsbóndi teirra gerst í øðini, tá ið hann frættir, at sandvíkingar aftur eru í Rituskor hendan dagin og sendir annan dreingin avstað aftur at taka brettið av og goyma tað.

Nú hendir tað, at hann kom av landnyrðingi, og tað fór at regna. Tað var ikki verandi í Skoruni, og teir tríggir menninir sluppu sær tí upp, men nú var einki bretti. Tað kom dátt við hjá teimum, tí sluppu teir ikki inn aftur, var ikki gott at vita, hvussu endin varð.

Andrias tekur tá til tey ráð at skoyta tvær fleygastengur saman, rør so tað triðju og stangararmarnar upp í skoytið, leggur tær um gjónna og hankar seg inn um eftir teimum. So fór hann til hús at fáa eitt annað bretti, so hinir báðir kundu sleppa inn um eisini, men tá møtti hann bygdarmonnum sínum, sum vóru farnir at vita, hvussu til stóð.

Andrias flutti norður um aftur og búsettist á Argjum. Hann var giftur við Sunnevu Jákupsdóttir úr Froðbæ, kallað Stóra. Sum smágenta var hon við bátinum, ið hvølvdist, tá ið urðin á Steinum - nakað vestanfyri Froðbiarnýpu - leyp.

Tríggir bátar dyrgdu tann dagin í juli stutt fyri ólavsøku, tá ið lopið kom. Tað var so stórt, at tað merktist heilt til Lítlu Dímun. Ein bátur hvølvdist, og tveir mans umkomust, meðan hini trý, ein av teimum var trý ára gamla Sunneva - bjargaðist. Vindur var komin undir skjúrtið hjá henni, og tí fleyt hon á tí.

Í komandi parti um 2 vikur verður greitt frá børnunum hjá Andreasi, serliga Johan í Horni, Hornabóndan



*Rituskor, har Andreas framdi sítt stóra avrik*



*Andreas var raskur útróðrarmaður. Hetta eru bátar á Argjum frá teirri tíðini, tá ið árin var einasta álit*




*Andrass Mortansson var abbi Andreas Danielsen. Hetta er minnisvarðin á Argjum, reistur í 1948*